


## Á Torginum

Gestir á Torginum týskvøldið. vera trúboðarahjúnini Regin og Heidi Guttesen. Vertur verður Absalon Absalonsen.



## Í føðingardag hjá The Boss

MORGUNSENDINGIN MIKUDAGIN 9-12

Mikudagin fyllir Bruce Springsteen 60 ár, og Morgunsendingin á Rás2 fer at halda føðingardagin hjá The Boss. Bruce Springsteen hevur givið rocktónleik út í meira enn 35 ár, men hann er framvegis til at kenna aftur. Hann syngur framvegis um verkamannan við dreyminum, og fyri mong er Springsteen ein ímy nd av frælsi og útlongsli. Tosað verður við Springsteen-kennara um sangirnar – og serliga rocklyrikkin – hjá The Boss, og nakrir sangir hjá Springsteen verða sjálvsagt eisini spældir.

# Skráin hjá

### Mánadagur 21. sept.

15:00 Tíðindi
15:15 Baresso radio
16:00 Tíðindi
16:05 Baresso radio
16:15 Tónleikur
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Reflex – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
22:00 Halleluja – tónleikasending
00:00 Liðugt

RÁS 2 ...títt radio

### Týsdagur 22. sept.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lysingar
14:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:15 Hanky Panky – Jóhan í Kollafirði og Eyðfinn Drewsen
16:00 Tíðindi
16:10 Hanky Panky
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Tónleikur
21:05 Á Torginum
22:35 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Mikudagur 23. sept.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsendingin – Eyðun og Mirjam eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 S&S – Mirjam & Barbara
16:00 Tíðindi
16:10 ShopTop – Alvin leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
19:45 3. hálvleikur – Sent verður úr bowlinghøllini á Hálsi í Havn
21:00 Úr skjáttuni – Frants Jensen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Morgunsendingin fer út at eta

### Týsmorgunin kl. 9-12

Í seinasta tímanum av morgunsendingini týsmorgunin, fara vertirnir út at eta í Hattrick í Want2Bowl í Havn.

Sent verður beinleiðis úr Want2Bowl millum 11.00 – 12.00, tá ið Barbara Holm og Mirjam Pætursdóttir fara at royna víðagitnu buffet'ina í Hattrick.





Nú hevur tín fyritøka ella stovnur møguleika at verða við í stóru og spennandi spurnarkappingini á Rás2.

Fyri at verða við í kappingini, skulu tit fylla tekningarseðilin í hesi lýsing út og senda hann til Rás2. Um tit hava serligt ynski um at møta ávísari fyritøku ella stovni, ber til at ynskja sær tað.

**VINNINGURIN** er ein firmatúrur við Norrönu í mai 2010 fyri 20 fólk.

Luttøkukostnaður: kr. 600,-



## STÓR FIRMAKAPPING

**Nú byrjar stóra firmakappingin á Rás2. Kappingin verður fríggjadag kl. 11.10-12.00**

Navn á virki: ____

Kontaktpersónur: ____

T-postur: ____

Tlf: ____

Hvørjum ynskja tit at kappast ímóti: ____

Sendið tekningarseðilin til:
**Rás2, Vágsbotnur,**
**Post Boks 76, FO-100 Tórshavn**
Merk brævbjálvan »Firmakapping«

S&S

Búgv sum ein forseti

## Vinn vikuskifti í CLINTON SVITUNI

MIKUDAGIN byrjar nýggj spurnarkapping á Rás2. Tú kanst bjóða teg fram at taka lut, og ert tú tann hepni, sum sleppur við í kappingina, kanst tú vinna eitt vikuskifti í stórslignu Clinton Svituni á Hotel Føroyum. Skriva »SoS« í eini sms-boð og send til nr. 1940 (prísurin er 30 kr. fyri hvørt sms).

Síðani verður lutakast millum øll tey, sum hava sent sms-boð, og tey, sum sleppa við í sendingina, skulu svara 10 spurningum í almennari vitan. Tvær ferðir kanst tú fáa hjálp at svara. Klárar tú ígjøgnum spurnarkappingina, er vinningurin tín.



MIKUDAGIN KL. 15.00



NICE PRICE!
HAMBURGARI 13,-
Bert galdandi í august mánaði
BURGER KING HAVE IT YOUR WAY®